# Islam og modernaða samfelagið kunnu ongantíð sameinast

*-Um tjúgu ár vilja tey vera 800.000 í Danmark, og hugsast kann, at tey um sama mundi fáa Islam staðfest í donsku grundlógini, sigur Bent Jensen, sum var í Føroyum um vikuskiftið.*



**-Eg eri ikki rasist. Eg eri anti-nasist, anti-kommunist. Mær dámar stutt sagt ikki totatiliterar ideologiir og átrúnað, har frælsið og demokrati verð sett til síðis, sigur Bent Jensen, professari, sum er kendur søgufrøðingur og skal kanna skjalagoymslur í gamla Sovjet fyri føroyingar**

LANDSFUNDUR
*Heri á Rógvi*

Løgmaður hevur sett Bent Jensen at kanna skjalagoymslurnar eystanfyri fyri føroyingar. Bent Jensen er útbúgvin Dr.Phil innan søgu og russiskt, og hann er víðagitin uttanlands fyri sínar kanningar, bøkur og meiningar. Fólkaflokkurin hevur fingið hann til Føroya um vikuskiftið at vera gestarøðara á landsfundi floksins. Hann hevur eisini í seinastuni verið frammi fleiri ferðir í donskum fjølmiðlum við sínum meiningum um eitt Islam, og hetta fingu áhoyrarnir á landsfundi Fólkafloksins eisini at hoyra um leygardagin. Hann undirstrikar, at ikki er í Føroyum fyri at styrkja um støðuna hjá Fólkaflokkinum, men hann vil fegin tosa allastaðni, har hann verður boðin. Einasta treytin er, at hann sjálvur sleppur at ráða yvir, hvat hann skal tosa um.

Tað skal fyrst og fremst sigast, at Bent Jensen als ikki tosaði um komandi kanningarnar eystanfyri, tá ið hann ikki er farin í holt við hesar enn. Tá vit eftir røðuna hittu Bent Jensen, greddi hann frá, at hann hevði borið eyga við okkurt um Føroyar í skjalagoymslum, men hetta vóru higartil smálutir í sambandi við, at hann hevði kannað um onkri donsk viðurskifti. Hann avvísir, at hann hevur sæð nakað føroyskt navn.

Áhoyrarnir sluppu tó at hoyra eitt sindur um sovjet og teirra søgu og hugmyndir. Áhugin fyri at seta spurningar eftir røðuna var eisini rættiliga stórur.

Bent Jensen greiddi eitt sindur frá um søguna hjá Sovjet og Russlandi. Í tí partinum av røðuni, sum snúði seg um sovjettisk viðurskifti, legði hann sera dent á, at í okkara parti av heiminum, so hava fólk lyndi til at »gloyma« viðurskiftini, tá ið tað kemur til ræðuleikarnar, ið Stalin og hansara menn stílaðu fyri. Hann nevndi ferð eftir ferð, at tey intilektuelle ella kultiveraðu hava slóðað fyri, at danir hava latið eyguni aftur fyri ræðuleikunum har, men samstundis havt eyguni opin fyri kreppum aðrastaðni, sum ikki byggja á komunistiskar tvørleikar.

### Elitan

-Kultur elitan eru tey penu fólkini við teimum røttu meininginum, sum altíð vilja tað rætta, serliga um tey ikki gjalda fyri tað sjálvi, sigur Bent Jensen.

Tað eru eftir øllum at døma at finna allastaðni, og ikki minst millum politikarar og onnur framstandandi fólk. Hesi hava sambært Bent Jensen skapt eitt slag av einum følskum veruleika.

-Tað eru tey, sum ikki hoyra til hetta fólkaslagið, sum kunnu síggja og hava sæð sannleikan, sigur Bent Jensen.

Bent Jensen vísir á, at tað innanfyri hægri lærustovnar og millum forløg hava víst seg at vera fólk, sum á sín hátt hava skrivað sólskinssøgur burturúr ræðuleikunum.

-Útbúgving er eingin treyt fyri at duga at síggja sannleikan, sigur Bent Jensen.

### Islam

Sambært tølum, sum Bent Jensen kom við á fundinum, so standa muslimar fyri stórum parti av lógarbrotunum, ið verða framd í Danmark. Islam var hitt stóra evnið, ið Bent Jensen tók upp á fundinum.

Hann greiddi gjølla frá sínum sjónarmiðum og hevði eisini eina rúgvu av tølum at vísa á. Sum áður nevnt, so er hann eisini kendur fyri sínari hugsanir um Islam og leikltin hjá Islam í einum modenaðum samfelagi sum eitt nú tað danska. Hann vísti á, hvussu stórur munur tað er á Islam og tí lívvstíli, ið vit leggja okkum eftir.

-Tað ber ongantíð til at sameina Islam og modernaða samfelagið, tá ið tað er ein so grundleggjandi og stórur munur, sigur Bent Jensen.

Tað er í veruleikanum hetta, sum er tað grundleggjandi. Munurin á Islam og modernaða samfelagnum er so grundleggjandi stórur. Hann vísti samstundis á munin millum Islam og kristindómin.

-Meðan guds ríki ikki er av hesi verð, so blanda muslimar trúgv og politikk saman, samstundis sum teir jú eisini niðurgera kvinnuna, sigur Bent Jensen.

Hann ivast heldur ikki í, at ávirkanin frá muslimunum fer at standa við og veksa.

-Um tjúgu ár vilja tey vera 800.000 í Danmark, og hugsast kann, at tey um sama mundi fáa Islam staðfest í donsku grundlógini, sigur Bent Jensen, sum ikki eina løtu ivast í, at muslimarnir kunnu fáa álvarsligar avleiðinar fyri okkara lívshátt, tá ið krøvini frá teimum eisini vilja veksa við árunum.

-Tað ringasta er, at onnur og triðja generatión av muslimum í Danmark, sum allir eru uppvaksnir í Danmark eru nógv meira víðgongdur enn ættarliðini frammanundan, sigur Bent Jensen.

Sambært Bent Jensen skulu vit føroyinar ikki vera so øgiliga bangir, tí muslimarnr fara mestir ikki at gera nakra stórvegis innrás í Føroyum.

### Ikki rasist

Tá ið tú lurtar eftir røðuni hjá Bent Jensen, so kanst tú lætt sita við einum ringum smakki í munninum. Hesin eldri danin, sum stendur og greiðir okkum frá, hvussu vandamikið tað er við Islam og muslimum. Tað er lætt at gera sær tað niðurstøðu, at her hava vit ein fasist og rasist. Ikki tí, tað kemur ikki nøkrum við, hvønn politiskan hugburð maðurin hevur. Hetta er eitt rættiliga óføroyskt evni. Bent Jensen heldur eisini, at støðan er og fer at vera øðrvísi í Føroyar enn eitt nú í Danmark. Hann væntar ikki, at muslimarnir fara at gera nakra innrás í Føroyum. Hetta byggir á hansara persónligu áskoðan, sum hann sigur seg ikki so lætt kunna grundgeva fyri.

Bent Jensen dámar als ikki at verða skýrdur fyri at vera rasist. Hann vísir eitt nú á, at hann hevur ættleidd børn og eina russiska konu.

-Eg eri ikki rasist. Eg eri anti-kommunist, anti-nasist og ikki fasist. Eg eru ímóti átrúnaðum og ideologium, sum byggja á totaliter prinsipp, sigur Bent Jensen.

Hann sigur seg hava valt nógvar ymiskar flokkar, tá ið val hevur verið á skránni. À listanum eru: SF, Venstre, Liberal centrum, sum ikki er til longur, og Socialdemokratarnir.

Ein av hansara størstu hetjum er George Orwell, sum hevur skrivað m.a. bókina 1984, sum flestu skúlanæmingar muge kenna.

-George Orwell var sjálvur uttanfyristandandi í samfelagnum, og hann undirstrikar eisini í sínum bókum, hvussu tað kann vera vandamikið at gerast ov intilektuellir, sigur Bent Jensen.

Bent Jensen fer nú undir meiri skipaðar kanningar í sambandi við kanningarnar eystanfyri, sum hann kallar tað.

Hann heldur uppgávan vera sera spennandi og vónar at okkurt spennandi spyrst burturúr.



# Tjóðveldisflokkurin trupul men einasti møguleikin

**Hóast politikkurin hjá Tjóðveldisflokkinum oftani gongur Fólkaflokkinum ímóti, so ynskja fólkafloksmenn aftur at samstarva við Tjóðveldisflokkin eftir komandi løgtingsval**

LANDSFUNDUR
*Orð og myndir:*
*Heri á Rógvi*



*Á landsfundinum hjá Fólkaflokkinum var semja um, at samstarvið við Tjóðveldisflokkin eigur at halda fram fýra ár afturat*

– Fýra ár afturat, so er sloppið á sjálvstýrisleið, segði løgmaður, Anfinn Kallsberg, tá ið hann prædikaði fyri sínum kóri á landsfundi Fólkafloksins leygardagin. Eitt er tað, at val er í hondum, og løgmaður, sum leiðarin fyri sín flokk, vil eggja limunum at byrja valstríðið. Eitt annað er, at tað eru fýra ár afturat við somu samgongu, tá skuldi verið sloppið. Hetta sama við somu samgongu, og harvið Tjóðveldisflokkinum, tóktist eisini at vera niðurlagið á landsfundi Fólkafloksins, sum jú varð hildin í Klaksvík leygardagin. Fólkafloksfólk vóru so at siga á einum máli um, at samstarvið við Tjóðveldisflokkin eigur at halda fram, og hugsað eigur ikki at verða um nakran annan samstarvsmøguleika enn Tjóðveldisflokkin. Sjálvstýrisflokkurin fekk ikki tað nógvu umrøðuna á fundinum, uttan tað, at fólkið undraðist yvir, hvussu tað gekk við teirra landsfundi aðrastaðni í býnum. Men mann má ganga útfrá, at eisini Sjálvstýrisflokkurin passar inn í ætlaninar hjá fólkafloksmonnum eftir komandi løgtingsval. Eingin ivi er um, at hóast nógv ymisk evni komu upp at venda, so er tað sjálvsstýrismálið, sum upptekur fólkafloksmenn mest, og hetta teir fyrst og fremst vilja tryggja.

### Munur

Stóru ideologisku munirnir ella andsagnirnar millum Fólka- og Tjóðveldisflokkin komu veruliga til sjóndar á landsfundi Fólkafloksins. Ferð eftir ferð funnust fundarluttakararnir at Tjóðveldispolitikarum og politikkinum hjá Tjóðveldisflokkinum, men samstundis lótu teir ongan ivi vera um, at Tjóðveldisflokkurin eigur at vera samstarvsfelagin hjá flokkinum eftir komandi val.

Anfinn Kallsberg vísti á, at Tjóðveldisflokkurin eisini hevði svølgt nógvar kamelar í samstarvinum við Fólkaflokkin.

Tað vóru tó nakrir av fundarluttakarunum, ið ikki valdu at nýta so diplomatisk orð fyri at lýsa partar av politikkinum hjá hinum stóra loysingarflokkinum í Føroyum.

Millum annað var funnist at tí, at Tjóðveldisflokkurin millum manna oftani verður skýrdur fyri at vera tann reini loysingarflokkurin, og hetta gjørdu teir sær dælt av. Samstundis sum politikkurin hjá Tjóðveldisflokkinum á nógvum økjum fekk sína sak fyri á landsfundinum.

Partur av fólkafloksveljarunum eru kanska ikki so sjálvstýrissinnaðir sum flestu tjóðveldisveljararnir, soleiðis at tað hevur týdning at fara hóvliga fram, varð mint á landsfundinum. Óli Breckman fíltist eisini á, at Tjóðveldisflokkurin yvirhøvur stillar upp til fólkatingsvalið, tá ið hetta merkir, at teir viðurkenna donsku grundlógina. Honum dámdi heldur einki, at Tjóðveldisflokkurin hevði lyndi til ikki at viðurkenna, at Føroyar eru partur av danska ríkinum.

### Á sama lista

Tá alt er sagt um ymisku ósemjurnar ella munirnar millum Tjóðveldis- og Fólkaflokkin, so skal tað eisini við, at fólkafloksmenn og kvinnur sera fegin vilja vera verandi úti í Tinganesi saman við Tjóðveldisflokkinum.

Onkur fór so langt sum at siga, at Tjóðveldisflokkurin og Fólkaflokkurin skuldu stilla upp saman til komandi fólkatingsval.

Anfinn Kallsberg segði m.a., at hetta var fyrsta samgongan, sum hevði sitið út í eitt í longri tíð.

Luttakararnir á fundinum fegnaðust eisini yvir gongdina á sjálvstýrisleið, sum eisini varð rópt fyri tann upprunaliga ætlanin hjá Fólkaflokkinum. Hóast flokkurin ikki vil missa tann meiri sambandssinnaðu partin av sínum veljarum, verður tað framhaldandi sjálvstýri, sum fær fyrsta prioritet hjá flokkinum.

# Eitt stig tann rætta vegin

**Soleiðis kallaði Óli Breckman gongdina á sjálvstýrisleið á landsfundinum hjá Fólkaflokkinum. Hann ánaði eisini ein vandi við leiklutin hja Tjóðveldisflokkinum við komandi fólkatingsval. Hann fegnaðist yvir búskaparliga gongdina og tendensirnar framyvir**

LANDSFUNDUR



*Ein atkvøða til Tjóðveldisflokkin ein atkvøða til Nyrup, men ein atkvøða til Fólkaflokkin verður ein atkvøða móti Poul Nyrup Rasmussen, segði Óli Breckman á landsfundi Fólkafloksins leygardagin.*

Eftir, at formaðurin fyri starvsnevndina hja Fólkaflokkinum hevði greitt stutt frá um virksemið hjá flokkinum, Steintór Jacobsens, so kom Óli Breckman framat við einari frágreiðing. Óli viðgjørdi og gjørdi viðmerkingar til farna árið og støðuna í samfelagnum. Eisini fólkatingsvalið fekk eitt orð við á vegnum.

Óli greiddi eisini frá, hvussu varð við fólkaatkvøðuni, sum skuldi vera í vár. Hann greiddi frá, at danski stjórnin hevði við sínari støðu gjørt tað ómøguligt at halda atkvøðuna.

Tað tóktist tó ikki sum um, at Óli Breckman var heilt vónbrotin av hesum, tá ið hann kallaði nýggju sjálvsstýrisleiðina fyri tað upprunaligu ætlanina hjá Fólkaflokkinum. Sum heild virkaði hann eisini rættilig fegin um gongdina sum hon er nú. Hann kallaði gongdina og seinastu stigini við yvirtøkum fyri eitt stig tann rætta vegin. Somuleiðis vísti hann á, hvussu týdningarmikið tað var, at føroyingar hava fingið gongd á yvirtøkunar.

– Samgongan steðgaði mestsum eisini orsakað av avlýstu fólkaatkvøðuni, og partar av tjóðveldisflokkinum skipaðu fyri einum fundi á Vaglinum, har serliga Fólkaflokkurin fekk av grovfíluni, men nú er runnið samanaftur, og uppskotið um sjálvstýri Føroya fólks varð samtykt í løtinginum, segði Óli á røðu sínari á Landsfundi Fólkafloksins.

Óli Breckman hevði í røðu sínari hug at geva løgmanni og Fólkaflokkinum heiðurin fyri, at betri glið er komið á samráðingarnar.

Um hinar flokkarnar segði fólkatingslimurin hjá Fólkaflokkinum, at Sambandsflokkurin hevði verið til at hava við at gera á búskaparliga økinum, men hann er framvegis líka sørur í sjálvstýrismálum.

Javnaðarflokkurin hevði skuffað Óla Breckman. Serliga var hann sárur um, at flokkurin var farin á val seinast sum sjálvstýrisflokkur, men seinni hevði broytt kós.

Nú fólkatingsval av álvara stundar til, so var tað heldur ikki so løgið, at Óli Breckman eisini tók hetta evni upp. Hann vísti á, at flokkurin til komandi fólkatingsval kundi ynskt sær borgarliga stjórn í Danmark. Hann segði nakað um, hvat flokkurin serliga fer at leggja seg eftir í valstríðnum. Hann metti samstundis eina andsøgn vera í, at Tjóðveldisflokkurin stillar upp til fólkatingsvalið, tá ið hetta merkir, at teir sum so taka undir við donsku grundlógini. Hann vísti á, at við ætlanum hjá Tjóðveldisflokkinum verður ein atkvøða til Tjóðveldisflokkin ein atkvøða til Nyrup, men ein atkvøða til Fólkaflokkin verður ein atkvøða móti Poul Nyrup Rasmussen. Somuleiðis ásannaði hann vandan í, at Fólka- og Tjóðveldisveljarar fara at berjast um atkvøður. Hetta kann, sambært Óla Breckman, enda við, at Sambands- og Javnaðarflokkurin renna avstað við hvør sínum umboði í Fólkatinginum komandi fýra árini. Óli vildi samstundis eisini fegin hava løgmann, Anfinn Kallsberg, at stilla upp. Hetta heilt ein av fundarluttakarunum tó ikki vera heilt rætt, tá ið støðan hjá løgmanni var nakað serligt. Eisini vildu onkur av luttakurunum hava Tjóðveldis- og Fólkaflokkin at stilla upp saman, og vísti á, at hetta kanska kundi verið gjørt undir navnið Sjálvstýrisfloksins, og hetta má væl eisini merkja, at Sjálvstýrisflokkurin er vælkomin í hetta samstarvið.

So líkt Óla Breckman, so tók eisini veljarakanningarnar fram, og legði eisini dent á, hvussu illa flokkurin plagar at klára seg, og hvussu tað plagar at ganga gott allíkavæl. Samstundis ásannaði hann, at flokkurin ikki hevði tey bestu tølini í løtuni.

Tvíbýti millum fólkafloksveljararnar um sjálvstýrisspurngin metti Óli Breckman eisini vera ein álvarsspurning, sum flokkurin átti at taka til eftirtektar.